# Vágs skúli

## Lærarastørv í Vágs-skúla

lýst leys til setanar frá 1. august 2007

- **1 lærari í fast starv frá 1. august 2007.**
- **2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008** fyri lærarar við niðursettari tíð og serligan tørv
- **1 lærari í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/2008 (umleið 17 tímum um vikuna).** vegna serligan tørv og avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- eru stundisligir og nærlagdir

**Haraftrat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**
- Alis./evnafrøði-, landalæru-og enskt í framhaldsdeildini
- Føroyskt-, enskt-, søgu-, náttúru og tøkni-, lívfrøði-, handarbeiði-, tilevning-,kristni-, ítrótt-, støddfrøði- og serligan tørv í barnaskúlanum.

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og ljósriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 20. juni kl 10.00**

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til Óla í Hjøllum, skúlastjóra, á tlf. 373192 ella 222896

Vágs-skúli hevur komandi skúlaár umleið 230 næmingar í 13 flokkum og um 26 lærarar.

---

VESTMANNA KOMMUNA

# PEDAGOGUR OG AVLOYSARI

## til Látipípuna

**Søkt verður eftir:**
Einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 16.08.2007 at rokna.

Einum avloysara, sum kann arbeiða, tá stovnurin hevur tørv á tí.

Látipípan er ein stovnur við plássi til 22 útibarnagarðsbørn og frítíðarstovubørn í 1. og 2. flokki.

Pedagogstarvið er í frítíðarstovuni og avloysarastarvið er í frítíðarstovuni og í útibarnagarðinum.

**Vit kunnu bjóða:**
- Ein stovn í náttúruvøkrum umhvørvið við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjørðu.
- Ein fittan vælvirkandi bólk av børnun.
- Góðan starvsfólkabólk.

**Vit vænta av tær:**
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, eins væl sum í bólki.
- Tú hevur góð samstarvsevnir.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

Nærri fæst at vita við at ringja til Maluna Stórá, leiðara, á tlf. 230145.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Skrivlig umsókn við prógvi og møguligum viðmælum verður at senda til Vestmanna Kommunu **í seinasta lagi mánadgin 25.06.2007, kl 12:00.**

LÁTIPÍPAN

---

Søkt verður eftir

# Umsjónarmanni/ arbeiðsformanni

**at byrjað 1. august 2007 ella eftir nærri avtalu.**

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at umsita ávís økir og ognir hjá kommununi
- at leiða dagliga arbeiðið hjá kommununi
- dagligt viðlíkahald av kommunalum vatn- og kloakkskipanum
- rakstur av gøtuljósum
- at skipa fyri kavagrevstri
- viðlíkahald av vegum og gøtum

**Vit vænta at tú:**
- hevur leiðsluroyndir
- dugir væl at samstarva við onnur
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur teldukunnleika
- hevur koyrikort
- kann ráðgeva í tekniskum viðurskiftum

**Vit kunnu bjóða:**
- møguleika fyri skeiðum innan arbeiðsøkið
- eitt fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg

**Setanarviðurskifti:**
- Starvið er fulltiðarstarv
- Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millum KAF og avvarandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal sendast til:
**Sandavágs Kommuna**
**Hammerhaimbsvegur 1**
**FO-360 Sandavágur.**

Umsóknirnar skulu merkjast »Umsjónarmaður«

Eru spurningar, fæst meira at vita við at ringja á tlf. 332470 el 214070.

Sandavágs Kommuna skilar sær rætt til at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at seta.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Umsóknarfreistin er 25 juni 2007 kl. 10.00.**

**Sandavágs Kommuna**
www.sandavagur.fo

Hammershaimbsvegur 1 · FO-360 Sandavágur
Tel. +298 332 470 · Fax. +298 333 470
sandavagur@sandavagur.fo

---

# HH-húgvurnar frá '94

**Tann 16. juni** hittast vit øll somul í Hornahúsunum í Havn. Reyp um skúladagar, prát, sangur og hugni verða á skránni, og so er bara at taka góða lagið við.

Tilmeldingar til veitsluna fer fram við at senda teldubræv til klassaball@sosialurin.fo

**Kostnaður 400 kr.**



---



# PICK UP TIL SØLU

Mitsubishi L200 árg. 09/01 koyrt 85.000 km.
Lastbilurin hevur sleipikrók.

**Tlf 211269**

---

# RUKO LÁSATÆNASTA

Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem

Vit eru serkønir á økinum



VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ · TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 · TÓRSHAVN · TEL 30 10 20